# Doktararitgerð um dálkandi evni í føroyingum




*Ritgerðin um dálkandi evni í føroyingum, kann lánast á Deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu, Sigmundargøta 5 í Tórshavn*

DOKTARARITGERÐ
*tíðindaskriv*

Dýrabiðidag vardi evnafrøðingurin Britta Fängström eina PhD ritgerð um Føroyar á universitetinum í Stockholm. Ritgerðin hevði heitið: "Human exposure to organohalogen compounds in the Faroe Islands".

Britta Fängström starvast á umhvørviskemisku deildini á universitetinum í Stockholmi. Tað var á hesi deildini, at tey á fyrsta sinni ávístu PCB dálking í náttúruni. Seinastu árini hevur verið gott samstarv millum Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í Føroyum, deildina fyri umhvørvislæknafrøði á Syddansk Universitet og umhvørviskemisku deildina á universitetinum í Stockholm. Tilfarið í ritgerðini byggir á hetta samstarvið.

Fängström hevur kannað innihaldið av umhvørviseitrandi evnum í blóðinum hjá føroyskum kvinnum og børnum. Eisini hevur hon kannað innihaldið av hesum evnum í grind og spiki, í havhesti og í havhesta- og í lomvigaeggum. Hon hevur bæði kannað tey "gomlu" kendu eiturevnini, so sum PCBir, men eisini hugt at evnum, sum fyri nýliga eru komin út í náttúruna, so sum polybromeraði difenyletur, eisini rópt bromeraðir eldtálmarar. Samanumtikið vísir ritgerðin, at mongdin av eiturevnum í fólki er sera høg í Føroyum, samanborið við aðrar partar av verðini. Grundin er dálkaður matur úr havinum, serliga hvalur og havhestur.

# Almenn framløga um máltøkni

**Á samkomu í Norðurlandahúsinum hósdagin 28. apríl kl. 14.00 verður almenn framløga av tveimum verkætlanum, ið hava snúð seg um at menna føroyskt mál tøkniliga**

FØROYSK TELDUTALA
*tíðindaskriv*

Føroysk teldutala er verkætlan, sum byrjaði fyri fimm árum síðan, og sum nú er liðug. Verkætlanin hevur ment eitt forrit, sum kann lesa føroyskan tekst. Skipanin var fyrst og fremst ætlað sum eitt hjálpartól hjá blindum og lesitarnaðum. Við taluni kunnu tey sjálvstøðugt kanna sær vitan av netinum og samskifta við onnur á føroyskum skrivtmáli.

Arbeiðið hevur vakt stóran ans millum málfrøðingar í hinum Norðurlondunum. Samstundis hevur loysnin skapt grundarlag fyri øðrum KT-loysnum, har talan er um at samskifta frá teksti til talu.

Fyri málsliga og tøkniliga arbeiðinum hava staðið Sjúrður Gullbein frá Føroya Blindastovni, Pétur Helgason frá universitetinum í Uppsala og Kjell Gustafson frá svensku fyritøkuni Acapela Group. Verkætlanarleiðari hevur verið Karin Kass frá Føroya Blindastovni.

Høvuðsstuðulin hevur verið NorFA "Nordisk sprogteknologisk Forskningsprogram"

**Teldutøkt føroyskt tekstasavn**

Kirsti Hansen, lektari á Göteborgs universiteti, hevur verið samskipari í einum NorFa-netverkið, sum hevur arbeitt við einum teldutøkum føroyskum tekstasavni, og Kirsti Hansen hevur eisini sjálv ment eitt elektroniskt tekstasavn, sum fevnir um ein árgang av Dimmalætting. Hetta tekstasavn er ein virðismikil fongur í øllum sløgum av málsligari greining. Her verður m.a. hugsað um tíddargreining av úrvaldum orðum, setningafrøði, mállæru og kanningar av hevdbundnum orðingum. Við dømum verður víst, hvussu tekstasavnið kann fremja áhuga, tilvit og gransking í føroyskum máli.

Í 2004 hevur ein verkætlan, sum miðaði eftir at marka eina ávísa nøgd av teldutøkum teksti, verið framd á Føroyamálsdeildini. Endamálið við arbeiðinum er at gera eitt tekstasavn, sum er markað við málfrøðiligum upplýsingum og at gera ein orðalista út frá leitiorðum og bendingarupplýsingum í Føroyskari orðabók. Eitt slíkt markað tekstasavn er ein fyritreyt fyri at koma longri í sambandi við telduforrit, sum kunnu viðgera føroyskt mál. Dømi um tílík forrit kunnu eitt nú vera leitiskipanir, tekst-til-talu skipanir og hjálparamboð til undirvísing og rættlestur.

Heini Justinussen hevur staðið fyri tí tøkniliga partinum av arbeiðinum og Zakaris Svabo Hansen og Mortan Vang hava tikið sær av tí málfrøðiliga partinum. Granskingarráð Føroya fíggjaði verkætlanina.

Framløgudagin verður kunnað um arbeiðið við hesum verkætlanum, og víst verður, hvussu amboðini kunnu nýtast í verki.

Útgreinað skrá fæst í húsinum á framløgudegnum.

**Lesið Sosialin - so eru tit við**

